# Stór páska-sølustevna á Tvøroyri

*Klokkan fýra í dag lata dyrnar upp á sølustevnuni í ítróttarhøllini á Tvøroyri*




*Hesa vikuna hava arbeiðsdagarnir í ítróttarhøllini verið langir, men Jóan Petur Olgarsson, formaður í fyrireikingarnevndini, sigur, at tá ið stevnan letur upp, verður alt til reiðar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hesar næstu fýra dagarnar verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmurin um eina stóra páska-sølustevnu, við nógvum framsýnarum, undirhaldi og skemti.

Tað eru Tvøroyrar Bóltfelag, Tvøroyrar Svimjifelag og Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, sum skipa fyri stevnuni.

Umframt sølustevnuna, verður eisini eitt mini-tivoli í hinari høllini, sum er í sama húsi - sí greinina niðanfyri.

Á stevnuni fara einar 25 fyritøkur úr øllum landinum at vísa fram og tær hava alt møguligt at vísa fram. Eitt nú eru fýra bilasølur við.

Men annars eru handlar við sum selja alt frá teldum og telduútgerð, klæðum, stereoútgerð, bilaútgerð, blomstur, fløgur og mangt annað.

Umframt fyritøkurnar, sum sjálvandi hava nøkur serlig stevnutilboð, verður eisini mótasýningar og undirhald av ymsum slag.

Stevnan letur upp í dag klokkan 16 og hon er opin til kl. 22 í kvøld.

Men klokkan 18 verður hon alment sett, og tað verður Dan Nielsen, býráðsformaður, sum setir hana.

Tá fer eisini Kirkjukórið Ljómur eisini at syngja.

Í morgin, fríggjadagin, er stevnan opin frá kl. 16 til kl.22. Leygardagin er hon opin frá kl. 14 til kl. 22 og seinasta dagin, sunnudagin er hon opin frá kl.16 til klokkan 20.

### Sangur, spæl og undirhald

Allar dagarnar, stevnan er opin, verður ymiskt undirhald, bæði fyri børn og vaksin.

Klokkan 19 hóskvøldið, aftaná at stevnan er sett, fara Kristian Blak og dótturin, Rebecca, at spæla, hann spælir klaver, hon violin.

Fríggjadagin klokkan 18 og leygardagin klokkan 15 fara Jessie og Sára úr Porkeri at dansa Creamy.

Fríggjakvøldið klokkan 20 og leygardagin kl. 19 verður mótasýning.

Sunnudagin klokkan 17 fer bólkurin Shalder Geo hjá Kristian Blak, o.ø, at spæla.

Og sum rosinan í pylsuendanum fer Ragnar í Vík at syngja og spæla leygardagin kl. 17.30.

Og klokkan 19 sunnukvøldið, áðrenn stevnan endar, verður gallashow við mótasýning og tónleiki.

Eitt nú fara Rakul og Magni at syngja.

Tá verður eisini kunngjørt, hvønn gestirnir hava valt til vakrasta básin.

Tann, sum eigur básin, fær ein vinning.

Við hvørjum atgongumerki fylgir ein atkvøðuseðil, har fólk kunnu velja, hvønn bás tey halda verða vakrast.

Hvørt atgongumerki er samstundis ein lutaseðil og ein hálvan tíma, áðrenn stevnan letur aftur hvørt kvøld, verður burturluting, har vinningarnir eru ymsir lutir, sum fyritøkurnar, ið taka lut á stevnuni, hava latið.

# Ein søga um mat og misskiljingar

*MISSKILJINGAR. Ein skeiv sending úr einum handli til eini hjún elvdi herfyri til mikið høvuðbrýggj. Men endin var kortini ikki av leið. Í hvussu so er gagnaðist hann hjúnunum væl*




*Vanligar vørur, sum hesar á myndini, vóru tær, ið eini hjún væntaðu sær úr einum handli. Men tá av tornaði var gangurin fullur av alskyns kjøtvørum, sum bilførarin í handilinum hevði koyrt teimum heim...*

HØGNI MOHR

Fleiri føroyskir handlar og krambúðir bjóða viðskiftafólkum sínum eina serliga tænastu. Keypa fólk frá teimum, stendur teimum í boðið at fáa vøruna koyrda til hús. Fyri einki. Summar familjur, ið ikki eiga bil, brúka hesa tænastu meira ella minni fast. Soleiðis gjørdu eini hjún eisini ein dagin í farnu viku.

### Kjøtfjall í ganginum

Konan í áðurnevnda hjúnarlagi hevði verið til handils hendan dagin. Hon hevði, sum vanligt, avtalað, at handilin skuldi koyra vøruna heim. Seinnapartin sama dagin, júst tá ið *maðurin* er komin heim, kemur vørubilurin við vøruni. *Konan* er enn í býnum og ger ørindi. Tá ið maðurin kemur niður í gangin, har vøran stendur, er bilførarin í vørubilinum longu farin. Hann hevur úr at gera, og tað skal ganga skjótt fyri seg.

Beinanvegin sær maðurin, at her ruggar ikki rætt. Vørunøgdin á gólvinum er nógv størri enn vanligt. Umframt fleiri beriposar, á tremur við vanligum húsarhaldsvørum, hevur konan eftir øllum at døma eisini keypt eina fulla erskju av kjøti.

### Fjáltur

- Hon man hava fingið álvarsom herindi av keypiøði, hugsar maðurin meðan hann í sveittabroti roynir at fáa kjøtið upp í køkina og í ta nærum fullu frystiboksina. Úrvalið av kjøti í eskjuni er øgiligt: Neytamjóryggjasteik, medistarapylsur, várrullur, høsnarungar, royktur laksur, alskyns neytabúffar og eitt veldigt nýsælendskt lambstjógv.

So hvørt, sum maðurin nærkast botninum á eskjuni, gerst hann meira og meira fjálturstungin. Túsundkrónuseðlar blaktra fyri eygum hansara, og hann hevur hug at øsa seg upp í skúm av hesum ótarnaða keypihuganum, sum konan eftir øllum at døma er ógrøðiliga rakt av.

### Keypti bara fars

- Tað var løgið. Eg havi ikki hoyrt, at vit skulu halda veitslu. Hví eri eg ikki boðin, spyr hann konuna, spoyskur á málinum, tá ið hon kemur upp gjøgnum trappurnar, júst afturkomin úr býnum.

Neyðars konan veit als ikki, hvat maðurin sipar til. Tá hann sigur frá um kjøtfjallið í frystiboksini, svarar hon grunaleys:

- Eg keypti bara eitt sindur av farsi...???

Nú klárnar. Tað skilst, at kjøtið er endað í skeivum húsum. Ringt verður til handilsmannin. Jú, hann skal bera so í bandi, at vøran verður avheintað. Dagur líður, men ongin kemur at taka rokan av matgoymsluni hjá hjúnunum.

### Vælgagnist

Morgunin eftir hittust maðurin og handilsmaðurin tilvildarligt á vegnum.

- Forrestin, hattar kjøtið. Sært tú. Viðkomandi, sum hevði keypt kjøtið, hevði keypt tað sum »kølt kjøt«, ikki sum »fryst kjøt«. Men nú hevur tú fryst tað. So eg havi sent teimum eina nýggja sending. Tú skalt eiga hitt kjøtið, segði handilsmaðurin.

- Takk fyri, segði maðurin og sendi umberandi hugsanir til konuna.

- Vælgagnist, segði handilsmaðurin.



# Ikki serliga bjartskygd

*Í gjár klokkan 14 sessaðust Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag aftur við samráðingarborðið - Vit eru ikki serliga bjartskygd. Vit vilja fegin koma til semju, men ikki fyri ein og hvønn prís, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna á Føroya Lærarafelag, sum er gingið við til at tosa um ársverk, fyri at fáa síni ynski við á samráðingarskránna*



*Vit vóna sjálvsagt semju, men orsakað av, at tað gekk so harðliga fyri seg bert at fáa tey tingini við, sum báðir partar hava skrivað undir í semjuni frá 31. oktober, so eru vit ikki serliga bjartskygd, segði Elsa Birgitta Petersen undan samráðingunum í gjár*
**savnsmynd**

DAGFINN OLSEN

Arbeiðssteðgurin hjá sáttmálasettum lærarum hevur nú vart í meira enn 5 vikur. Men í gjár seinnapartin klokkan 14 sessaðust Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið aftur við samráðingarborðið.

Eftir tógvið stríð samdust partarnir um uppritið, sum semingsmenninir komu við og nakrar boytingar máttu eisini gerast í uppritinum.

Um orsøkirnar sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, at tað var ymiskt úr semjuni frá 31. oktober 1999, sum felagið vildi hava við.

### Orsøkirnar

- Í semjuni stóðu ymsu økini við meira áløgdum arbeiði. Tey vildu vit hava við undir teimum evnum, sum vit skulu taka upp, sigur Elsa Birgitta Petersen.

- Vit fingu tey við eftir tógvið stríð. Fyri okkum tykist tað nærum, sum vil Fíggjarmálastýrið ikki ganga undir semjuna frá í fjør, sum báðir partar hava skrivað undir. Har stóð m.a., at samráðast skal um arbeiðstíð hjá lærarum. Har sigur Fíggjarmálastýrið so, at so skal eisini takast við ársverk ella arbeiðstíðarnormur hjá lærarum. Hetta stóð ikki í semjuni, men vit hava givið okkum og eru gingin við til at taka ársverk við, men so skulu eisini øll punktini við, sum stóðu í semjuni um meira álagt arbeiði, sigur Elsa Birgitta Petersen, ið fýlist á, at allan vegin hevur tað merkt gongdina í samráðingarstøðuni, at ársverkið hevur verið við, meðan, punkt hjá Lærarafelagnum hava verið tikin burtur.

### Ikki bjartskygd

Elsa Birgitta Petersen sigur, at sjálvsagt vónar Føroya Lærarafelag semju.

- Eins og øll onnur, so vóna vit sjálvsagt semju, men orsakað av, at tað gekk so harðliga fyri seg bert at fáa tey tingini við, sum báðir partar hava skrivað undir í semjuni frá 31. oktober, so eru vit ikki serliga bjartskygd. Vit vita, at tað verður eitt stríð at fáa okkara ígjøgnum, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag.

- Vit vilja fegin náa eitt úrslit og semju, men vit ætla ikki at gevast uttan víðari. Vit vilja semju, men ikki fyri ein og hvønn prís, sigur Elsa Birgitta Petersen.

### Páskafrítíðin vápn

- Vit eru klár yvir, at Fíggjarmálastýrið hevur nýtt páskafríðina sum taktiskt vápn. Men vit hava sagt, at vit hava einki ímóti at streyka í páskafrítíðini, men so skulu tey bert gera sær greitt, at hava vit goldið lærarum løn í páskafrítíðini, so fara vit ikki til arbeðis beint eftir frítíðina. Eg haldi, at tað fekk støðuna eitt sindur uppá pláss, metir Elsa Birgitta Petersen.

### Undir heilt

Tá samráðingarnar byrjaðu í gjár klokkan 14, merkti tað eisini fyri partarnar í samráðingunum, at teir fóru undir heilt.

- Vit fara undir heilt og úttala okkum ikki, segði Elsa Birgitta Petersen undan samráðingunum í gjár.

Sostatt eru tað bert semingsmenninir, sum nú kunnu koma við viðmerkingum um gongdina í samráðingunum. Málið liggur enn einaferð í teirra hondum.

# Føddur optimistur

*Karsten Hansen vísir aftur tí, sum Føroya Lærarafelag førir fram um, at Fíggjarmálastýrið hevur nýtt páskafrítíðina sum taktiskt vápn. - Tey eru farin í verkfall og tey vistu, at páskirnar komu. Vit hava ikki lagt páskirnar, sigur Karsten Hansen*



*– Eg eri føddur optimistur og eg trúgvi uppá, at vit finna eina loysn, sigur Karsten Hansen*

DAGFINN OLSEN

Fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen hevur góðar vónir um at finna eina loysn, nú samráðingar aftur eru byrjaðar millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag.

- Vónirnar eru góðar um at finna semju. Vit fara við opnum sinni til samráðingarborðið. Eg eri føddur optimistur og eg trúgvi uppá, at vit finna eina loysn.

Karsten Hansen viðgongur, at tað eisini lættir um, at Lærarafelagið gongur við til at tosa um ársverk, sum Fíggjarmálastýrið hevur strongt á at fáa við.

- Tað, at vit seta okkum saman, eftir so langan steðg, tað staðfestir álvaran í hesum. Eg vænti, at samráðingarfundurin kann gerast drúgvur, men tað ger einki og vit kunnu hava matpakka við, leggur Karsten skemtandi afturat.

### Ongar páskaspekulatiónir

Karsten Hansen vísir aftur tí, sum Føroya Lærarafelag førir fram um, at Fíggjarmálastýrið hevur nýtt páskafrítíðina sum taktiskt vápn.

- Tey eru farin í verkfall og tey vistu, at páskirnar komu. Vit hava ikki lagt páskirnar. Vit bóðu um at halda áfram, tá steðgur kom í, men felagið segði nei. Síðani hava semingsmenn gingið ímilum fleiri ferðir, men vit hava verið til reiðar alla tíðina, vísir Karsten Hansen á.

- At siga, at vit spekulera í páskafrítíðini er burturvið. Eg vóni bert at fáa frið á páskum, tí tað fekk eg ikki í fjør og eisini vóni eg at fáa semju áðrenn, fyri allar partar og tryggleikan í tí. Sjálvsagt veit eg, at verður semja ikki fyrr enn 3. páskadag, so er tað bíligari fyri landskassan. Men fáa vit semju beinanveg, so fáa tey løn frá tí løtu skrivað verður undir og so gjalda vit páskirnar, sigur Karsten Hansen avgjørdur.

### Ganga eftir leistinum

Karsten Hansen vil ikki tosa um smálutirnar í uppritinum hjá semingsmonnunum. Hann sigur, at semingsmenninir hava gjørt ein leist, ið Fíggjarmálastýrið hevur góðtikið, og nú verður arbeitt eftir hesum.

- Vit fara til samráðingarborðið við vón um semju. Nú hava vit roynt nógvar samráðingar og mangan hevur sæð svart út, men tað er altíð endað við semju og soleiðis verður óivað eisini nú. Tað trúgvi eg uppá, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

NORÐOYA SPARIKASSI

**Ársaðalfundur**

Ársaðalfundur Norðoya Sparikassa verður fríggjadagin 28. apríl kl. 19:00 á Klaksvíkar Sjómansheimi við hesi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing umsjónarráðsins um virki sparikassans í farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
4. Val av limum í umsjónarráðið.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot frá stjórn, umsjónarráði ella umboðsráðslimum.
7. Ymiskt.

**Umsjónarráðið**

Starvsfólkadeildin, Ósáveg. 1, Postboks 149, FO-700 Klaksvík,
Tlf. 456366 , Fax 456761, ns@ns.fo, www.ns.fo